

# Eitt ávíst snið

**BYGGIÁHUGI**

*Nógv nýggj sethús er bygd tey seinastu árini norðuri í Sørpum í Sandavági. Teir báðir í byggifyritøkuni Bulur, fremst Jákup Suni Joensen og aftari Angi Johannesen fóru fyrr í ár í holtur við enn eini á hesum staði*

*Savnsmynd: Jens Kristian Vang*

**HÚSABYGGING** - Ynskini hjá fólki í Vágum og okkara útboð vísa seg at hóska sera væl saman. Vit hava valt okkum eitt ávíst snið, soleiðis at vit ikki gera somu húsini sum aðrir, sigur Jákup Suni Joensen, stjóri í byggifyritøkuni Bulur á Signabø. Fyritøkan varð stovnað í 1998

Snorri Brend

**Sandavágur:** - Ja, tað vísir seg at okkara spesiali at byggja eittplanhús, er sera væl egnað til landslagið og eftirspurningin í Vágum, slær Jákup Suni fast.

Í góðveðrinum ein dag fyri páskir í ár var stjórin sjálvur og ein av monnum hansara staddir í nýggju útstykkingini í Sørpum í Sandavági. Klárt skuldi gerast til enn eini sethús á hesum staði.

Tey seinnu árini eru nógv sethús bygd í teimum stóru bygdunum í Vágum. Felags fyri fleiri teirra er, at grundøkini hava ligið í slættlendi og hava haraftrat verið stór - upp í móti 700 fermetrum og meiri.

Teir fóru tá undir hús nr. 12 í Vágum. Hesi skuldu byggjast í Sandavági, í eini útstykking har pláss er fyri eini 30 sethúsum.

- Vit plaga at siga, at tað tekur okkum tríggjar mánaðir frá tí vit byrja, til húsini eru klár, greiðir Jákup Suni frá.

Hóast tíðirnar er broyttar og fíggjarkreppa herjar kring allan heimin, hevur hetta kortini ikki tikið burtur áhugan hjá fólki at seta føtur undir egið borð.

At teir skuldu byggja hús í Vágum er ikki nakað eindømi. Hesi húsini eru í roynd og veru teirra tólvta, bara í Vágum.

- Vit hava lagt okkum eftir eittplans-húsum fram eftir jørð. Og tað hevur teimum dámað sera væl her vesturi, sigur Jákup Suni.

# Eitt navn sum forpliktar

## - At arbeiði í eini fyritøku við heitinum “H-dygd”, tað forpliktar, sigur Egil Petersen sum seinastu árini hevur havt starvsstað sín í Vatnsoyrum. Her er hann við í framleiðsluni av millum annað vindeygum og hurðum til føroyska marknaðin

Snorri Brend

**Vatnsoyrar:** - Fyri meg er eingin ivi um, at ein fyritøka sum hevur eitt navn við orðinum “dygd” er forpliktað uppá tað. Men vit klára at liva upp til navnið, slær Egil Petersen fast.

Allir mans eru til arbeiðis henda dagin fyrr í vár, tá Sosialurin vitjaði á virkinum. Tað er skilligt at síggja, at teir hava úr at gera.

Her ræður um, at hvør maður ger sína skyldu so livast kann upp til krøvini, ið sett verða til tilfar, arbeiði og leveringstíð, bæði tá talan er um framleiðslur úr timbri ella træ/alu.

Hetta kemur ikki av ongum, tí seinastu 30-40 árini er eitt stórt arbeiði gjørt til tess at menna vindeyguni alt meiri og meiri til tann føroyska marknaðin.

- Eg tori í øllum førum at standa inn fyri, at vit liva upp til okkara navn. Vit levera bara vørur í hádygd.

### Kendar vørur

Vindeyguni og hurðarnar hjá H-dygd eru so líðandi vorðin kend millum manna, serliga millum timburmanna.

Í fyritøkuni hava tey serliga selt til Klaksvíkar og Havnar, eins og byggifyritøkur, sum t.d. Norðsetur brúka teirra vindeygu.

Slíkt kemur ikki av ongum, og Egil hevur sjálvur sína frágreiðing um, hví tað er vorðið soleiðis:

- Ja, tað er eingin ivi um, at okkara satsing uppá hádygd hevur givið úrslit. Okkara vindeygu skulu vera góð, tey skulu vera tøtt og tey skulu latast kundanum, tá tey skulu, greiðir Egil frá.



**EFFEKTIVT**

*- Vit leggja okkum eftir at levera vørurnar til tíðina, sigur Egil Petersen, sum starvast hjá H-dygd í Vatnsoyrum. Henda maskinan ger sítt til leveringstíðin kann haldast*

*Mynd: Jens Kristian Vang*